ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
VESTARA BRYGGJA - 3800 TÓRSHAVN
Telefon 17811 - Postbox 1134

28.februar 1985

Skráset. nr.
(at tilskila í svari)

Okkara ref.: ED/hr.

Tygara ref.:

Tilmæli til Föroya Landsstýri.

Landsstýrið setti tann 25.8.1983 ein arbeiðsbólk fyri at kanna, hvussu ein virkisheilsutænasta kundi koma at virka í Förovum.

Arbeiðsbólkurin bleiv samansettur av:

Högna Debes Joensen, Landslækni
Petur Zachariassen, Stöðisútbúgvingin
Sjúrður Rasmussen, Landsstýrið
Eli Davidsen, Arbeiðseftirlitið

Bólkurin hevur kannað, hvussu slíkar tænastur eru skipaðar í okkara grannalondum, og hvussu hesar virka.

Kanningarnar vístu, at hetta er eitt ov stórt og tungt virkandi tiltak at seta í verk her í Föroyum, og kom bólkurin til ta niðurstöðu, at skilabesta loysnin varð at seta ein 1/2-dags arbeiðsmedicinara í Arbeiðseftirlitið.

Hendan skipan kann so seinri útbyggjast við fysio/ergoterapeuti.

Í tí fylgjandi hevur bólkurin gjört eina ætlan yvir:

1. virkið hjá arbeiðsbólkinum framyvir
2. neyðuga broyting í arbeiðaraverndarlógini
3. broyting í kunngerð um internt tryggleikaarbeiði
4. útbygging av Arbeiðseftirlitinum, soleiðis at hetta kann koma at virka til fulnar fyri trygd og heilsu á arbeiðsplássunum.

FÖROYA LANDSSTÝRI
TINGANES
3800 Tórshavn
--------------

viðv. F.L. j. nr. 948-1-1 8

ad.1. Arbeiðsbólkurin mælir Landsstýrinum til, at bólkurin verður umskipaður til eitt arbeiðsumhvörvisráð við hesum limum:

Stjórin fyri Arbeiðseftirlitið
Landslæknin
Stjórin fyri Skipasýnið
Eitt umboð fyri Heilsufrøðisligu Starvsstovuna
Eitt umboð Landsstýrið (lögfrøðingur)

og at reglugerð verður gjörd fyri hesum.

Endamálið við einum slíkum arbeiðsumhvörvisráð er at gera uppskot til kunngerðir og reglugerðir við heimild í galdandi lóg, og at gera tilmæli til Landsstýrið í tulkingarspurningum, tá hesir taka seg upp á arbeiðsmarknaðinum viðv. trygd og heilsuvandum v.m.

ad.2. Arbeiðaraverndarlógin hevur nú verið í gildi í 10 ár uttan stórvegis broytingar, og metir bólkurin, at tíðin er komin, tá lógin má endurskoðast og útbyggjast, soleiðis at hon eisini fevnir yvir sjálvt arbeiðsumhvörvið. Hetta kundi möguliga verið gjört við tí donsku arbeiðsumhvörvislógini sum fyrimynd tillagað okkara viðurskiftir. Vit vildu soleiðis fingið eina lóg, sum líkist lógunum á hesum öki í hinum norðanlondum, og vildi hetta verið ein stór hjálp í okkara norðurlandasamstarvi við at samskipa tær ymisku reglugerðir og forskriftir.
Vit vilja hervið mæla Landsstýrinum til at seta eina arbeiðsnevnd til at gera uppskot til eina nýggja arbeiðsumhvörvislóg fyri Föroyar og at bólkurin verður umboðaður í hesi nevnd.

ad.3. 23.januar 1979 lýsti Landsstýrið eina kunngerð um internt tryggleika arbeiði, og snýr hendan seg m.a. um val av tryggleikaumboðum á virkjum, sum hava 10 ella fleiri fólk í arbeiði. Skipanin hevur ikki virkað so gott, sum ætlað, tí torfört er at fáa fólk til at lata seg velja til hetta arbeiði, tí tey í flestu förum meta seg alt ov illa vard móti uppsögn.
Í §8 stk.3 stendur, at tryggleikaumboðið er tryggjað móti uppsögn v. á sama hátt, sum álitisfólk fyri viðk.ella tilsvarandi fakliga arbeiðsöki. Hetta er ikki nóg mikið, tí á nógvum plássum er eingin álitismannaskipan, og har hon er, virkar hon ógvuliga vánaligt. Neyðugt er tí at broyta §8 stk.3, soleiðis at hendan fær eitt meira nágreiniligt innihald, og vilja vit mæla til at nýta tekstin fyri uppsögn í funktionærlógini.
Hetta kundi verið grundað á, at viðkomandi eisini er umboð Arbeiðseftirlitisins úti á virkjunum.

viðv. F.L. j.nr. 948-1-12

ad.4. Arbeiðseftirlitið eigur at útbyggjast og decentraliserast, soleiðis at Föroyar verða býttar upp í eftirlitsökir -umdömir- sum víst á síðu 4, og har hövuðs- og skrivstovudeildin verður í Tórshavn.

Uppbýtingin kemur soleiðis til at umfata:

Umdömi 1: Norðuroyggjar + Fuglafjörð og Lorvík mannað við 1 eftirlitsfólki.

Umdömi 2: Restin av Eysturoynni mannað við 1 eftirlitsfólki.

Umdömi 3: Suðurstreymoy + Nólsoy, Hestur og Koltur.

Manning:

Stjórin fyri Arbeiðseftirlitið
1 eftirlitsmaður (dampketlar og virkir annars)
1/3 eftirlitsmaður (elevatorar, kavaraútgerð v.m.)
1 eftirlitsmaður (heilsufröðisligar mátingar v.m.)
1 byggikonsulentur (byggiplássir - byggisakir v.m.)
1/2 arbeisðmedicinari + evt. fysio/ergoterapeut
1 1/2 skrivstovufólk

Umdömi 4: Suðuroy + Sandoy, Skúvoy og Dímunar mannað við 1 eftirlitsfólki.

Umdömi 5: Norðurstreymoy, Vágar og Mykines mannað við 1 eftirlitsfólki.

Her er roknað við, at serdeildirnar og skrivstovan í Umdömi 3 eru landsdekkandi, og at öll vanlukkuhagtöl verða viðgjörd her.

viðv. F.L. j. nr. 948-1-1 8

UPPBÝTING AV ARBEIÐSEFTIRLITINUM Í 5 UMDØMIR.




948-1-1 8

Samandráttur:

1. Mælt verður til, at undirritaði arbeiðsbólkur verður umskipaður og möguliga víðkaður til eitt arbeiðsumhvörvisráð, og at ein arbeiðsskipan verður gjörd fyri hetta.

2. Mælt verður til, at skjótast gjörligt verður sett ein arbeiðsnevnd at gera uppskot til nýggja arbeiðsumhvörvislóg fyri Föroyar.

3. Mælt verður til, at kunngerð frá 23.januar 1979 um internt tryggleikaarbeiði §8 stk. 3 verður broytt, soleiðis at lógliga vald tryggleikaumboð fáa eina betri vernd móti uppsögn.

4. Mælt verður til, at Arbeiðseftirlitið verður útbygt eftir frammanfyri standandi ætlan, og at útbyggingin verður framd yvir eitt 3- ára skeið við hesi prioritering:

a. 1985. Eitt eftirlitsfólk sett í Umdömi 1.
b. 1986. Eitt eftirlitsfólk sett í Umdömi 2 + ein byggikonsulent sett í Umdömi 3.
c. 1987. Eitt eftirlitsfólk sett í Umdömi 4 + eitt eftirlitsfólk sett í Umdömi 5.

Her er roknað við, at 1/2-dags arbeiðsmedicinarin og 1/2-dags skrivstovufólkið, sum longu nú eru tikin við á fíggjarlógini fyri 1985 verða sett skjótast gjörligt aftaná 1.apríl 1985.

Tórshavn tann 26.marts 1985

Vegna arbeiðsbólkin

Landslæknin
Högni D.Joensen

Stöðisútbúgvingin
Petur Zachariassen

Landsstýrið
Sjúrður Rasmussen

Arbeiðseftirlitið
Eli Davidsen

Viðv. F.L. j.nr. 948-1-1^8